# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo, runa@sosialurin.fo, Fartelefon 222983

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

Havnar Svimjifelag:

## Nostalgisk móttøka í Svimjihøllini

**Leygardagin 24. juli skipaði Havnar Svimjifelag fyri móttøku í Svimjihøllini í Gundadali í sambandi við at 40 ár vóru liðin, síðan fyrsta liðið hjá felagnum fór til Danmarkar at luttaka í eini svimjikapping**

Tey sum fyri 40 árum síðan vóru við fyrsta liðinum, sum Havnar Svimjifelag sendi til Danmarkar at luttaka í svimjikappingum í 1964, høvdu nógv at tosa saman um og minnast aftur á, tá tey møttust í Svimjihøllini í Gundadali seinasta leygardag.

Tveir av luttakarunum, Hedvig Poulsen og Bjarni Rubek Nielsen, vóru komin úr Danmark í samband við dagin.

Øll fingu hvør sína blusu, sum varð gjørd í hesum sambandi.

Eftir at felagsmynd var tikin, var móttøka í kantinuni í Svimjihøllini. Ein av fyrireikarunum, Victor Carlsen, beyð øllum at vera vælkomin. Hann segði frá ymiskum, hugleiddi um túrin og mintist annan av ferðaleiðarunum, Bobby Brockie, sum doyði 13. apríl í fjør, 76 ára gamal.



*Felagsmynd av teimum sum møttust í Svimjihøllini leygardagin 24. juli 2004.*
*Aftasta rað f.v.: Christian Ihlen, Tórshavn, Victor Carlsen, Tórshavn, Finnur Lützen, Tórshavn, Brynhild Mohr Joensen, Tórshavn, Hedvig Poulsen, Esbjerg, og Marjun á Fløtti, Argir.*
*Miðraðið f.v.: Karin Joensen, Tórshavn, Bjarni Rubek Nielsen, Gadstrup, Kai Aage Troest, Saltangará, Heri á Lava Olsen, Tórshavn, og Poul Nolsøe, Tórshavn.*
*Fremra rað f.v.: Guðbjørg Christiansen, Tórshavn, Elna Skylv Hansen, Tórshavn, og Jóngerð Høgnesen, Hoyvík.*
*Erla Mørch, Pandrup, og Edna Brockie, Tórshavn, vanta á myndini*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*

Bobby var ein av eldsálunum í Havnar Svimjifelag og var í mong ár heiðurslimur í felagnum. Í kantinuni var eisini ein framsýning við myndum, avísútklippum, ymiskum lutum og gomlu svimjidraktunum.

Teir 15 svimjararnir kláraðu seg væl á túrinum og vunnu teir tær flestu kappingarnar.

Tá móttøkan var liðug, varð skipað fyri ymiskum, m.a. einari kappsvimjing við núverandi limir í Havnar Svimjifelag, eisini varð ymiskt undirhald í teimum ymsu hyljunum, ið fekk tey at minnast gomlu tíðina í svimjihylinum í Gundadali, eins og "gomlu" svimjararnir royndu síni kynstur og evni í hylunum.

Um kvøldið var skipað fyri veitslu.



*Victor Carlsen beyð øllum at vera vælkomin, segði frá ymiskum áhugaverdum og hugleiddi um túrin í 1964*
*Mynd: Magnus Gunnarsson*



*Tveir sum altíð hava svomið nógv - eisini í gamla svimjihylinum í Gundadali, Bjarni Rubek Nielsen og Jógvan Asbjørn Skaale*
*Mynd: Magnus Gunnarsson*



*Hilda Jacobsen, sum arbeiddi í gamla svimjihylinum í Gundadali frá 1960 og Poul Nolsøe, sum var við á Danmarkarferðini í 1964*
*Mynd: Magnus Gunn0arsson*



*Johan Norðfoss, sum arbeiddi gamla svimjihylinum í Gundadali og í Svimjihøllini frá 1963-90, og ÍSF forsetin, Heðin Mortensen*
*Mynd: Magnus Gunnarsson*



*Nógv fólk vóru til móttøkuna í kantinuni í Svimjihøllini, fremst á myndini eru: Heri á Lava Olsen, Sigurð Lamhauge, Finnur Lützen, og Christian Ihlen*
*Mynd: Magnus Gunnarsson*



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo, runa@sosialurin.fo, Fartelefon 222983

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Bo Isholm leiðari á Tórshavnar Musikkskúla

Herfyri setti Tórshavnar Býráð 53 ára gamla Bo Isholm í starv sum leiðara fyri Tórshavnar Musikkskúla.

Bo er føddur í Keypmannahavn tann 10. august í 1950.

Hann hevur hollar royndir sum musikkskúlaleiðari, tí í 12 ár, frá 1984-96, var hann leiðari á musikkskúlanum í Tårnby.

Í 1996 kom hann til Føroyar, og hevur verið í starvi sum guitar-lærari, fyri tað mesta við Tórshavnar Musikkskúla, men eisini við musikkskúlan í Suðuroy. Seinasta skúlaár hevur hann virkað sum fyribilsleiðari á Tórshavnar Musikkskúla.

Bo er uppvaksin í Keypmannahavn og búði har til 1996. Hann er hálvur føroyingur, sonur Solveig Isholm, fødd í Havn og Henry Svendsen úr Keypmannahavn. Solveig er dóttir Christian Holm Isaksen, ella Kristin í Geil, sum hann varð róptur, ið eitt skifti var blaðstjóri á Tingakrossi.

Bo eigur sonin, Andreas. Hann býr saman við Honnu Áarstein (Piddan), sum eigur børnini, Gvøðny, Bárður og Eyðfinn.

Bo hevur útbúgving frá Fynske Musikkkonservatorium, Kgl. Danske Musikkonservatorium og frá Early Music Center í London. Hann stóð tón-



leikanámsfrøðiliga roynd í 1976 og diplomroynd í 1978.

Í eini 10 ár starvaðist hann sum free-lanse tónleikari og lærari, og hevði konsertir í Danmark, Svøríki, Týsklandi, Luksemborg og Fraklandi.

## Lydia Arge 80 ár

Fríggjadagin 30. juli fyllir Lyda Arge í Tórshavn 80 ár.

Lydia er dóttir Elsebeth Frederikku f. Poulsen av Neyst í Hvalba og Hans Hendrik Eide Hansen av Eiði.

Í 1950 giftist hon við Eliesar Arge og eiga tey døturnar Honnu, sum býr í Ísrael og Sigrid, sum býr í Havn. Lydia eigur 6 ommubørn, Jael, Ruth og Alon Eliesar og Sáru, Onnu Katrinu og Honnu Elisu.

Hon er uppvaksin í Keypmannahavn, har hon fekk sær útbúgving sum barnarøktari og sjúkrasystur.

Mitt í 60-unum flutti familjan til Føroya, tá Essa varð settur í starv á Landssjúkrahúsinum.

Lydia var við til at stovna fimleikafelagið, Ljósið, og hevur hon sjálv undirvíst har øll árini.

Lydia er serstakliga áhuga í samfelagsviðurskiftum, og hon hevur ikki hildið sína hugsan fyri seg sjálva, men gjøgnum árini



verið ein íðin lesarabrævaskrivari.

Hon er sera virkin kvinna og hevur fingið nógv álitisstørv litin í hendur.

Føðingardagurin verður hildin saman við familjuni.

## Nýggir leiðarar á dagstovnum

**Tórshavnar kommuna hevur sett nýggjar leiðarar í 6 kommunalar dagstovnar: Dagstovnin á Landavegnum, Býlingshúsið í Maritugøtu, Dagstovnin í Løkjatúni, Dagstovnin í Kaldbak, Dagstovnin við Botnánna í Kollafirði og Dagstovnin Kurl@**

Kirstin Djurhhus er sett sum leiðari fyri Dagstovnin á Landavegnum, Inga Mariu Amandusardóttir í Býlingshúsinum í Maritugøtu, Jensina Magnussen í Dagstovninum í Kaldbak, Ann Jacobsen sum leiðari í Dagstovninum Kurl@ og Siv Joensen í Dagstovninum við Botnánna í Kollafirði. Charlotta á Váli Olsen, ið er leiðari í frítíðarskúlanum á Argjum, heldur fram sum leiðari fyri Dagstovnin í Løkjatúni, sum eisini fer at hýsa børnum í frítíðarskúlanum á Argjum.

**Charlotta á Váli Olsen** er 50 ára gomul. Hon fekk prógv sum pedagogur á Personale Háskúlanum á Islandsbrygge í Keypmannahavn í 1978. Sama ár byrjaði hon í starvi á Føroya Barnaheimi. Í 1982 fór hon á Stella Maris vøggustovu, har hon 1. desember 1986 varð sett í starv sum leiðari. Síðani 1. august í 1991 hevur hon verið leiðari á Frítíðarskúlanum á Argjum. Frítíðarskúlin verður nú lagdur saman við nýggja dagstovnin í Løkjatúni, sum Charlotta verður leiðari fyri.

**Kirstin Djurhuus** er 48 ár og útbúgvin pedagogur í 1992 frá Føroya Læraraskúla. Áðrenn Kirstin fór á pedagogskúla, starvaðist hon í mong ár innan serstovnadeildina hjá landinum, eisini arbeiddi hon eitt skifti innan dagstovnaøkið.

Sum námsfrøðingur hevur Kirstin starvast í Býlingshúsinum undir Fjalli, har hon eisini avloysti leiðaran í eitt ár. Síðani 1997 hevur Kirstin verið leiðari í Býlingshúsinum millum Gilja.

**Inga Maria Amandusardóttir** er 47 ár og útbúgvin pedagogur frá Kolding barnagarðsseminarium. Inga Maria hevur drúgvar royndir innan bæði bú- og dagstovnaøkið, harumframt hevur hon verið leiðari á Vøggustovuni við Velbastaðvegin í trý ár. Í løtuni starvast Inga Maria sum økispedagogur í dagrøktarskipani hjá Tórshavnar kommunu.

**Jensina Magnussen** er 30 ár og útbúgvin pedagogur á Esbjerg seminarium 2001. Jensina hevur royndir innan bæði bú- og dagstovnaøkið. Í løtuni starvast hon sum varaleiðari í einum sambýli fyri ung.

**Ann Jacobsen** er 33 ár og útbúgvin pedagogur í 1998 á Hovedstadens Pædagog- seminarinum. Ann hevur royndir við bæði vøggustovu- og barnagarðsbørnum. Síðani 1. mars í ár hevur Ann verið varaleiðari í Kurlu.

Siv Joensen er 30 ár og útbúgvin pedagogur frá Høgskolan í Finmark í 1997. Siv hevur royndir við børnum bæði í vøggustovu- og barnagarðsaldri. Hetta seinasta árið hevur Siv verið varaleiðari í Barnagarðinum millum Bóla í Kollafirði.

Nýggju stovnarnir byrja at taka ímóti børnum 16. august.




### 90 ára føðingardagur

Mina Wang Hansen úr Nólsoy, búsitandi í Havn, verður 90 ár ólavsøkuaftan Føðingardagurin verður hildin saman við familjuni á Hotel Føroyun 1. august.

### Dagurin

**28. juli. Aurelius**, deyður umleið 852. Í faðirætt vóru bæði hann og konan Natalia av mauriskum fólki, men tey vóru í loyndum kristin. Tá ið tey saman við øðrum alment viðgingu kristnu trúgv sína, vórðu tey tikin av mauriska emirinum og hálshøgd.

**29. juli. Ólavsøka** verður hildin til minnis um, at norski kongurin Ólavur Haraldsson fell á Stiklastøðum í árinum 1030. Eftir deyða hansara hendu mong undurverk við grøv hansara og skjótt verður hann mettur sum mikið halgimenni og fær navnið *Ólavur hin Heilagi.* Minningardagur hansara varð hildin um øll Norðurlond, men serstakliga í Føroyum hevur dagurin í øldir verið hildin sum mikil hátíðardagur, sum Janus Djurhuus sigur frá:

*Stiklastaða vápnabrestur*
*slongdist yvir havið vestur.*

Ólavsøkan gjørdist tjóðarhátíð okkara. Hon var eyðkend við, at tingið varð sett ólavsøkudag og hildin varð ólavsmessa í Havnar kirkju. Eisini tey árini, tingið varð sett seinni um heystið, var ólavsøkugudstænasta hildin. Tað er í nýggjari tíð, at ólavsøkuhaldið, sum tað nú er, er íkomið. Tingsetan og gudstænastan eru við sama lag óloysandi partur av ólavsøkuhaldinum. Frígingarmyrkt sigst vera tveir tímar á ólavsøku.

Ólavur er norrønt navn, ið merkir bæði *ættfaðir* og *eftirmaður.*

**30. juli. Abdon**, deyður umleið 250. Høgt mettur embætismaður í Róm, sum varð tikin av døgum fyri kristnu trúgv sína.

†

Kunngjørt verður fyri ætt,vinum og kenningum,
at okkara kæra mamma, vermamma, omma
og langomma

**Anna Elisabeth Thomsen**
Tórshavn

andaðist á Lágargarði 26. juli, 93 ára gomul.

Jarðarferðin verður lýst seinni.

*Familjunnar vegna*

**Jákup, Tummas Pauli, Margreta og Matilda**

Tey, ið vilja minnast Lisabeth við blómum ella kransi, kunnu í staðin lata eina peningagávu til Lágargarð, kt. nr. 655.821.8 í Føroya Sparikassa